Fra: Eivind Jacobsen <eivind@r7.fo>
Sendt: týsdagur, 11. apríl 2023 11:43
Til: Løgting <logting@logting.fo>
Emne: LM-096/2022

Att Fíggjarnevndin

Vísandi til tlf. samrøðu við Eyðgunn Samuelsen, sendi eg hesar fáu reglur.
Kundi hugsa mær at komi á fund við fíggjarnevndina í samband við tilfeingisrentu, sum var nógv umrødd í Løgtinginum í samband við LM-096/2022 : Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin) (Dagføring av gjøldum, veiðigjald fyri lodnu og heystgýtandi sild og strikan av undantaki fyri heimaflotan)

Undirritaði hevur í nógv ár gjørt ymiskt í samband við tilfeingisrentu. Frymilin eg havi brúkt er hin sami sum fiskimálaráðið, Hans Ellefsen, brúka. Eg fekk hendan frymil frá Fiskimálaráðnum í Excel umvegis alment innlit fyri nógvum árum síðan. Nevnast kann, at frymilin bara brúkar ganga, dividera, pluss, minus og prosentrokning. Restin er tá ein spurningur um atgongd til tøl.

Eg havi, mótsætt Fiskimálaráðnum, fingið innlit í røttu avreiðingartølini og hýruna sum er munandi øðrvísi enn tað fiskimálaráðið sigur. Einaferð vóru Jan og Annfinnur í KVF og upplýstu, at hatta vóru onnur tøl enn tey, teir kendu til.

Harumframt er tað soleiðis at útrokna tilfeingisrenta er eitt tal langt uppi í rokniarkinum og tí er trivaligur partur av tilfeingisrentuni longu goldin.

Útrokningin í 2014 var at manningin skuldi gjalda 84% av tilfeingisrentuni ella 396 mió. av í alt 472. Reiðarin hevði tá eisini goldið helvtina av sínum tilfeingisgjaldi sum skatt. Sigast kann, at tá røtt tøl verða sett í frymilin hjá Fíggjarmálaráðnum, so sær roknistykki munandi øðrvísi út.

Eg havi gjørt eina 70 síður langa frágreiðing um tilfeingisrentu og brúkt emperisk tøl sum ikki eru somu tøl sum fiskimálaráðið hevur brúkt.

Eg gangi út frá, at fíggjarnevndin hevur áhuga í at hava røtt tøl at taka støðu út frá.

Eg eri ávegis at gera eina framløgu uppá 10 minuttir. Sjálvandi kann eg svara spurningum, men vanliga hava nevndir ikki meira enn 15 minuttir til hvønn fund.
Undirritaði skal uttanlanda 19 apríl í minst 14 dagar í samband við granskingarverkætlan í fiskivinnu.

Vinarliga

Eivind Jacobsen
Strendur
tlf. 747254